## Málleyst hjá Frem

Frem við tveimum føroyskum spælarum í hópinum spældi leygardagin venjingardyst ímóti B93. Nógvur vindur var á Keypmannahavnarleiðini leygadagin, og tað ávirkaði dystin. Einki mál kom í dystinum, men stutt fyri leiklok var Atli Danielsen um reppið at senda eitt fríspark í málið. Atli spældi allan dystin á miðvøllinum. Gunnar Nielsen var eykamálmaður, men hann kom ikki á vøllin hesaferð.



## Málmaður skoraði frá egnari hálvu

Alt kann henda, bert bólturin er rundur og 11 menn eru á hvørjum liðið, hevur ofta verið tikið til, men at málmaðurin fær mál frá egnari hálvu, hoyrir til tað meira sjáldsama. Hetta hendi tó í 3-1 sigrinum hjá Tottenham móti Watford.

Stutt inni í annan hálvleiki varnaðist Tottenham málmaðurin Paul Robinson, at Ben Foster í Watford málinum var farin dekan ov langt út á vøllin. Robinson, ið júst tá skuldi taka eitt fríspark, tók møguleikan og buldraði til bóltin, ið fleyg uppi yvir høvdinum á neyðars Foster og beint í málið.

Dysturin endaði 3-1 til Tottenham.

StÍF–KÍF: 25 - 32

# Kollfirðingar vóru grammari eftir bronsuni

**KÍF streyk avstað við bronsuni eftir ein uppibornan sigur á StÍF. Kollfirðingar vóru betri allan dystin, og teir sýndu størri vilja enn strandingar. Ein uppiborin bronsa gjørdist sostatt endin á einum flottum kappingarári hjá KÍF**

HONDBÓLTUR

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*KÍF vann bronsu í gjár, eftir at teir høvdu bast strandingum við 32 – 25*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

KÍF og StÍF hittust í gjár til ein sannan bronsudyst. Vinnandi liðið fekk bronsuna, og tað gjørdist KÍF, sum dróg longra stráið.

Kollfirðingar byrjaðu betri, og teir høvdu ein mun á 2 – 4 mál meginpartin av fyrra hálvleiki.

Daniel Rapa var sera góður í fyrra hálvleiki. Hann smekkaði bóltarnar in eftir vild, og Marian fekk einki gjørt við teir.

Damir Oros var mansvardur allatíðina, og hetta gav gott pláss til Daniel, sum ikki smæddist at skjóta útifrá.

Bárður Danielsen mansvardi Damir Oros, og tað megnaði hann bara væl. Damir skoraði nøkur mál uppá uppstilling til fríkast, men annars fekk hann ikki so nógv burturúr.

Hóast hann var mansvardur, gjørdist Damir toppskjútti við 13 málum. Hjá KÍF vóru málini fordeild yvir einans 5 leikarar, meðan 10 leikarar hjá StÍF skoraðu.

### Lág leikferð

Dysturin í gjár var ikki tann mest áskoðaravinarligi. Tað var sera lítil ferð á álopinum hjá báðum pørtum.

Hjá kollfirðingum var Damir Oros mansvardur, og tí fingu ter ongantíð spæli at glíða frá einum vongi til hin. Tað var einmansavrik frá serliga Daniel og Damir, sum gjørdu útslagið fyri KÍF.

Hjá StÍF riggaði heldur ikki væl í álopinum. Finnur, Leivur og Sveinur spældu í bakkketuni, og teir tóktust ikki at vera heilt samanspældir. StÍF megnaði í øllum førum ikki at finna tað skjóta spælið fram, sum einaferð var eyðkenni hjá liðnum.

StÍF spældi ein yvirgang við tveimum strikuspælarum, og tí gjørdist heldur ongantíð talan um flótandi spæl. Kollfirðingar nýttu eisini møguleikan til at mansverja antin Sveinur ella Finn, tá ið strandingar høvdu eina útvísing.

### Sigurin ongantíð í vanda

StÍF fekk strítt seg upp beint áðrenn hálvleik. Eftir hálvleikin hingu strandingar í eina løtu, men kollfirðingar høvdu tó allatíðina eina trygga leiðslu á í minsta lagi 2 mál.

Ingi Johannesen á vinstra vongi hjá KÍF var tryggur, tá ið hann varð spældur í gjøgnum.

Bárður Danielsen varð tikin út í seinna hálvleiki, og tað sást aftur á Damir. Hann byrjaði at skora eftir vild, beinanvegin tá ið Bárður Óla Kristjan í málinum hjá KÍF yvirskuggaði Marian hendan dagin. Gert og Rógvi stríddust eisini væl.

Í seinna hálvleiki sá út til, at strandingarnir longu vóru farnir í summarferiu. Teir gjørdu nógvar feilir og høvdu torført við at skora.

Tað var tó stuttligt at síggja at tveir ungir leikarar, Rúni Niclassen og Sjúrður Djurhuus, sloppu at royna seg ein góða løtu. Teir skoraðu 2 mál hvør og spældu rættiliga væl.

Hesir eru tveir av leikarunum, sum strandingar vænta sær nógv av í framtíðini. Tað verður spennandi at fylgja teimum framyvir.

### Krúnan á kappingarárinum

Tá ið samanumkom tóktust øll í høllini væl nøgd við at KÍF vann bronsuna. Viðhaldsfólkini hjá StÍF untu kollfirðingum tað væl, og leikararnir hjá StÍF tóktust ikki so skuffaðir. Møguliga tí at teir hava vunnið steypakappingina í ár.

Viðhaldsfólkini hjá KÍF bakkaðu sum altíð væl upp um sítt lið. Tey vóru møtt fjølment og hoyrdust nógv betri enn heimaáskoðararnir.

Samanumtikið kann sigast, at bæði leikarar og viðhaldfólk hjá KÍF vóru nógv grammari eftir bronsuni, enn strandingar vóru.

**FAKTA**

**Málskjúttar:**
**StÍF:** Leivur Justinussen 8, Finnur Hansson 6, Mortan Hansen 3, Sjúrður Djurhuus 2, Rúni Niclassen 2, Sveinur Justinussen 1, Andre Danielsen 1, Borgar Danielsen 1, Bárður Danielsen 1
**KÍF:** Damir Oros 13, Daniel Rapa 8, Gert Hansen 4, Rógvi Weihe 4, Ingi Johannesen 3
**Útvísingar:** StÍF 3, KÍF 4
**Dómarar:** Sámal Paulason og Kristian Johansen

**RHODELIOS**



## Maskotturin er til reiðar

Eingir Oyggjaleikir uttan ein maskott, og nú er hesin eisini til reiðar at taka ímóti ítróttarfólkunum, sum leita sær til Rhodos í summar.

Hesa ferð er maskotturin eitt reinsdjór, og hóast vit ofta seta hesi í samband við norðara partin av Finnmørkini, so finnast slík eisini í skóginum á Rhodos.

Navnið er ein samanrenning av Rhodos, har leikirnir jú skulu haldast, og Helios, so merkir sól. Sólin er vanliga búmerkið hjá griksku oynni, og ivaleyst fer hennara styrki eisini at seta sín dám á, tá kappingarnar fara fram í bakandi hita.